3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

DAGFINN OLSEN

Marilyn Manson

the last tour on earth

Havi enn ikki heilt funni› útav, hvat Marilyn Manson er. Ma›ur ella kvinna? Har er svari› helst ma›ur. Eisini er hetta navni› á bólkinum.

Tra›ki kanska á tærnar á teimum, i› veruliga eru fallin fyri hesum og hava tiki› tónleikin til sín. Kann tó í mínum stilla sinni hugsa, at kanska er ikki talan um tær í hópatali, sum eg tra›ki á.

Ein brennandi krossur sæst á fløguhúsanum. Inni í sæst manningin og ta› er heldur ikki vakurt og hugaligt. Útsjóndin er punk - fført eini 3 stig vi›ari.

Ein live-fløga. Har›ur rockur!!

Veit ikki hvat "koncepti›" er. Myndirnar føra ein beinlei›is í huganum til n‡nazismu. Skal tó ikki halda uppá, at hetta er so, ella hvussu er vor›i›. Í hesum meldrinum av óhugaligum persónum og myndum, eru endurgivin smá tekstbrot úr Bíbliuni.

Stórvegis stendur ikki at lesa. Fari tí at heita á tey, i› hava henda áhuga, um at leita sær á heimasí›una hjá bólkinum;

marilynmanson.net

The Bloodhoundgang

Hooray for Boobies

Skjóttgangandi rockur í nútímans búna. Kann minna um enskan rock og t‡skan um hetta ver›ur blanda›.

Vælsvingandi rútmur, i› undirbyggja væl tann skemtiliga andan, sum henda annars álvarsliga rock/popp/rapp fløga tykist anga av.

Tekstirnir eru langir (og sera skjótt"lira›ir" av til tí›ir).

Ein fløga, i› ein óiva› eigur at ogna sær og sí›ani seta seg vi› í einsemi. Granska og lurta. Ikki tí at her er so nógv løgi› hjá tónleikakønum at grópa í. Sum so gongur lei›in beint út eftir landavegnum. Heldur eru ta› hugløgini, heildin og hetta at finna útav, hvat fyri ætlan, projekti, bólki og bakgrund henda fløga er úrslit av.

T.d. í lagnum Mope kenna lurtarar yvir tey 25 árini kanska seg aftur í "Relax don´t do it when you wann go to it" og "Rock me Amadeus" slíkt í ljóma›i í 80´unum og kanska tí›liga í 90´unum.

Vert at kanna nærri, hevur ein stundir til tess og hug og forvitni.

STARZ!?

Party

Nor›urlendskur gentuella kvinnurockur, vi› sambondum til Svøríkis og Danmarkar. Í fløguhúsanum sæst, at Irene Nord og Mia Johnsson eiga flestu løgini. Fløgan er mastra› í Stockholm av Bjørn Engelmann, men annars ganga donsk nøvn aftur í tøkkunum. M.a. fáa Jacob Haugaard og Se & Hør tøkk.

Kvinnurockur, i› flytir hugan aftur til áttatiárini, tá Joan Jett yvirtók heimin í le›urklæ›um, tá i› hon sang I love rock´n Roll og seinni I hate myself for loving you av fløguni Up your alley.

Tó er talan um 90´ára gó›sku á n‡ggju fløguni vi› Starx!? Hóast Mia Johnson hevur spælt "Power guitars" á nærum øllum løgunum so stendur ein harri (Johan Bejerholm) fyri at hava spælt øll ljó›førini, so sum í flestu førum í dag, so hava teldur óiva› havt stóran leiklut.

Stuttligt er at hoyra bæ›i 70´ara bólkin Sweet umbo›a›an og eisini Kiss er umbo›a› - bólkurin, sum ótarna›ur hevur hildi› á upp til okkara dagar, sí›ani 1970, ella har á lei›.

Chinn og Chapman lagi› Wig-Wam-Bam, sum Sweet á sinni leg›i ungdómin ni›ur vi›, er tiki› vi› á hesa fløguna. Ikki víkur útgávan so nógv frá tí upprunaligu.

Kiss lagi› Heaven´s on fire víkir heldur ikki so nógv frá. Ey›kenda Paul Stanley byrjanin, har hann vi› síni sermerktu rødd byrjar lagi›, er her naka› ta› sama, um enn meira geld. Her eisini eitt lag, sum sungi› av kvinnum, minnir um stílin hjá Joan Jett.

Ein stuttlig ella lívlig og vælsmakkandi fløga, i› ikki setir krøv ella er n‡skapandi.

Søtmeti fyri oyragangirnar.

Ongar broytingar í valskipanini nú

Samgonguskjalið nevnir ikki ætlanir um at gera broytingar í valskipanini soleiðis, at Føroyar verða til eitt valdømi. Landsstýrið arbeiðir tískil heldur ikki við at fremja tílíka broyting, sigur løgmaður m.a. í stutta svari sínum til fyrispurning

ÓLAVUR Í BEITI

Jákup Sverri Kass vildi hava at vita frá løgmanni í fyrispurningi, um landsstýrið arbeiðir við nøkrum ætlanum um at broyta føroysku valskipanina soleiðis, at øll valdømini verða løgd saman til eitt valdømi fyri alt Føroya land? Eisini vildi sjálvstýristingmaðurin hava at vita, um løgmaður heldur at farast skal undir at broyta valskipanina soleiðis, at vit fáa eitt valdømi fyri Føroyar eins og virkandi valskipan í Grønlandi?

Upp á tíðina

Í viðmerkingunum vísti Jákup Sverri Kass m.a. á, at Grønland hevði eina líknandi skipan, sum vit í Føroyum hava í dag. Teir gjørdu av fyri ikki so langari tíð síðan at broyta skipanina soleiðis, at alt Grønland gjørdist eitt valdømi. Nýggja skipanin í Grønlandi stóð sína royndi í fjør, og vísti tað seg, at skipanin hevði við sær, at fólk hugsa meira um persónin, tey velja, enn hvar í Grønlandi viðkomandi kemur frá.

– Tað er uppá tíðina, at vit føroyingar fáa møguleikan at velja politikarar, sum, vit meina, eru teir frægastu, óansæð hvar í landinum teir koma frá. Verða Føroyar eitt valdømi, so noyða vit okkara politikarar at hugsa landspolitiskt, og eg ivist ikki eina løtu í, at tað kemur at verða allari tjóðini at gagni, at allir politikarar noyðast at seta seg í samband við alt Føroya fólk og ikki bara tey, sum búgva í teirra valdømi.

Løgmaður ikki samdur

Men løgmaður Anfinn Kallsberg er stuttur í sínum svari til Jákup Sverra Kass, og vísur á, at samgonguskjalið nevnir ikki ætlanir um at gera broytingar í valskipanini soleiðis, at Føroyar verða til eitt valdømi. Landsstýrið arbeiðir tískil heldur ikki við at fremja tílíka broyting.

Og at enda sigur løgmaður, at hann hevur ikki ta áskoðan, at rætt er, at Føroyar eru eitt valdømi.

Uppritið framvegis í trúnaði

Á fundinum hjá uttanlandsnevndini í gjár var gjørt av, at uppritið til samráðingarnar við donsku stjórnina framvegis skal haldast loyniligt fyri almenninginum

JOHN JOHANNESSEN

Frá í gjár fingu liminir í uttanlandsnevndini endaligt loyvi at lata tinglimum uppritið til ríkisrættarligu samráðingarnar við donsku stjórnina. Men ritið verður framvegis hildið loyniligt fyri almenninginum.

Landstýrið hevur fleiri ferðir seinastu tíðina meldað út, at tað er fyri, at uppritið verður almannakunngjørt, nú fjølmiðlarnir hóast alt hava fingið frænir av innihaldinum. Men landsstýrið hevur somuleiðis víst á, at endaliga avgerðin, nær uppritið verður almannakunngjørt, liggur hjá landsstýrinum.

Tískil varð væntað, at uttanlandsnevndin fór at leysgeva uppritið eftir fundin fyrrapartin í gjár. Men so var ikki. Uttanlandsnevndin hevur tveitt bóltin aftur til landsstýrið. Hon sigur, at tá tað er landsstýrið, ið eigur trúnaðarstemplið, er tað eisini landsstýrið, ið eigur at gera av, um ritið kann almannakunngerast ella ikki.

Alt landsstýrið var við á fundinum í uttanlandsnevndini í gjár, tá tosað varð um, hvørt upprtið skal almannakunngerast ella ikki.

Høgni Hoydal, varaløgmaður og landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, váttar, at landsstýrið hevur ta áskoðan, at uppritið kann almannakunngerast. Men hann leggur dent á, at hetta má vera í samráð við uttanlandsnevndina. Hann nevnir tvær grundgevingar fyri hesum. Gott álit má nevniliga vera ímillum landsstýrið og uttanlandsnevndina í málinum, so samráðingarstøðan ikki verður sett í vanda. Harafturat má uttanlandsnevndin hava arbeiðsfrið, so málið verður viðgjørt í uttanlandsnevndini og ikki í almennum forum.

Men spurdur um, vit kunnu vænta, at uppritið verður almannakunngjørt í næstum, vísir Høgni Hoydal til formannin í uttanlandsnevndini, Hergeir Nielsen, sum sigur, at landsstýrið eigur trúnaðarstemplið og tískil eisini avgerðina. Aðrar viðmerkingar til málið vil hann ikki gera.

Hóast tað gongur orð av orði í uttanlandsnevndini um trúnaðarspurningin og um viðgerðina av samráðingaruppritinum, heldur landsstýrið málið vera komið so mikið langt, at tað í gjár sendi danska forsætisráðharranum, Poul Nyrup Rasmussen, bræv við áheitan um at seta hol á samráðingarnar í mars.

Suleskær í Føroyum

Í hesum døgum er spælimansbólkurin "Suleskær" á vitjan í Føroyum, her hann fer at spæla til undirhalds nakrar dagar. Bólkurin hevur verið til í meira enn 20 ár, við skiftandi manning úr ymsum londum, og tónleikurin, ið spældur verður, er úr Norðurlondum, USA og av teimum bretsku oyggjunum.

Tey, ið manna bólkin á ferðini í Føroyum, eru Ívar Bærentsen úr Føroyum, ið spælir gittar og mandolin, Ingrid Bærentsen úr USA, ið spælir floytu, og danirnir Peter Uhrbrand, ið spælir fiól, Dorthe Uhrbrand, ið eisini spælir fiól og Eskil Romme, ið spælir harmoniku.

Ferðaskráin hjá "Suleskær" nú um vikuskiftið verður henda: Hóskvøldið 8/2 spæla tey í Café Natúr í Havn, fríggjakvøldið 11/2 kl. 20:00 verða tey at hoyra umborð á sluppini "Høganesi" í Runavík, leygarkvøldið 12/2, á Fornminnissavninum í Klaksvík, sunnudag seinnapart 13/2, í Pæsastovu í Havn og møguliga onkustaðni mánakvøld og týskvøld.

Nótabók Svabos

Tiltakið í Pæsastovu í Havn sunnudagin 13/2, har "Suleskær" vera við, verður frá kl. 14:00 til 18:00 og tað er Føroya Fólkatónleikarafelag, ið skipar fyri. Hetta er ein sonevnd "work-shop", har øll áhugaði, limir ella ikki, eru vælkomin at vera við. Evnið er Nótabók Svabos. Henda nótabók sum J. C. Svabo (1746-1800) úr Miðvági fór undir at skriva í Keypmannahavn í 1775 varð í 1928 funnin á loftinum í Pæsastovu, har Svabo helt til seinastu 24 árini av lívi sínum.

Tað var Albin Bærentsen úr Havn, ið fann bókina. Meðan Svabo búði í Keypmannahavn vann hann sær eitt sindur av peningi við at spæla til dans við síni fiól, so meginparturin av tilfarinum í bókini - sum telur 176 síður - er tónleikur, ið europeiskir spælimenn nýttu í sambandi við dans í seinna helmingi av 18. øld. Upprunabókin, ið fyllir 225 í ár, er ikki í so góðum standi, og er í varðveitslu á Landsbókasavninum, men er til hetta høvið fotokopierað í nøkrum eintøkum. Hugsanin er so, at tónleikararnir, ið koma saman henda seinnapartin, fara at royna at geva nótunum lív aftur eina løtu. Tey, ið hava hug at vera við, verða biðin um at hava síni egnu ljóðføri við.

P. S. til bløðini: "Suleskær" koma/eru komin við eini fløgu, har ein tekning av bólkinum er á forsíðuni. Vónandi kunnu tit brúka hana afturvið greinini, sum helst skuldi verið í blaðnum hósdag.